# Nøvn

## Birgar við bókini »Tórshavn árið 1900«




Flaggdagin 25. apríl, millum kl. 14 og 18 verður nýggja bókin hjá Birgari Johannessen, »Tórshavn árið 1900«, løgd fram. Tilhaldið í Tórsgøtu verður karmur um útgávuna, og fæst bókin til keyps har.

Bókin snýr seg um Havnina ár 1900. Tað er serliga søgan um tey 49 fólkini, sum fødd vórðu í Havn hetta árið. Hvat tey fingust við, hvaðani komu, foreldur teirra, hvør makin var, og hvussu nógv børn hesi áttu.

Aftrat hesum verður alt tað, sum hendi í Havn hettar árið, eisini tikið við: 11 fingu skiparaprógv og ein fekk lærarapróg v, tríggir handlar og eitt ísvirki lótu upp. »Borgerrepræsentan tionen« fekk nýggjan lim. Tingið endar.

Bløðini skriva m.a., at havnarfólk eru ímóti, at útlendsk skip taka sand úr Sandagerði til barlast, tá tey fara tóm avstaðaftur. Eisini skriva bløðini, at havnarfólk vilja hava rekkverk framvið Havnará.

Vit fáa okkara fyrsta postkassa. Amtmansgarðurin verður laðaður. Tveir havnarmenn opna nýggjan fiskamarknað í Hollandi. Fýra sluppir verða keyptar í 1900, og 29 eru skrásettar frammanundan. Sostatt eigur Havnin 33 sluppir hetta árið.

Tað vóru 330 skattgjaldarar í Havn í 1900. Av teimum vóru 69 sjómenn, 46 arbeiðsmenn, 25 skiparar, 22 timburmenn, 18 politistar, 12 keypmenn og 10 skómakarar. Skattainntøkan var kr. 10.164,95. Umframt hetta er í bókini nógv annað upplýsandi og forvitnisligt um Havnina.

Bókin »Tórshavn árið 1900« er 111 síður, og eru í bókini 89 myndir. Bókin hevur fullfíggjað navnayvirlit yvir fólka, skipa- og staðarnøvn. Meginparturin av tilfarinum í bókini hevur ongantíð fyrr staðið á prenti.

Tað sum ger útgávudagin sermerktan er, at fleiri av børnunum hjá teimum, sum fødd vóru í Havn í 1900, verða til staðar í Tilhaldinum útgávudagin.

Tey sum keypa bókina »Tórshavn árið 1900« í Tilhaldinum flaggdagin, fáa bókina "Havnarmyndir - fyrr og nú" ókeypis ! Bókin »Tórshavn árið 1900« fæst eisini í bókahandlunum.

## Norska Løva á Eiði

**Norska Løva man bera eitt tað best kenda søguliga skpið, sum hevur verið í Føroyum. Nógv er skrivað um tað. Men vit hava fingið eitt íkast av Eiði**



Forsøgan er í stuttum, at fyrst í desember 1707 fór Norska Løva hjá danska Eystindiska Kompanínum úr Keypmannahavn við kós móti indiska býnum Trankebar. Hon var eitt trýmastrað skip við 36 kanónum. Hetta var eisini eitt stásiligt skip við øllum hugsandi skreyti. Manningin var 120. Nógv virði vóru umborð, so sum peningur, sum skuldi brúkast til at gjalda allar tær forkunnugu vørurnar, sum skuldu keypast at hava heim við sær.

Men skipið kom í illveður og rak fyri vág og vind. Hetta endaði við, at Norska Løva endaði á landi inni á Lambavík.

Tíðindini um alt ríkidømið umborð var eggjandi fyri nógvar ævintýrarar. Ein av hesum var tann kendi Óli Svendsen, vanliga kallaður Óla Svend, sum í fleiri umførum skipaði fyri leiting eftir Norsku Løvu á Lambavík, uttan tað tað tó kom stórvegis burturúr.

Eitt ítøkiligt minni um Norsku Løvu er modellið av henni, sum hongur í Havnar Kirkju.

Longdin er 91 cm í alt, skrokkurin er 59 cm langur, breiddin er 16 cm, og stórmasturin er 78 cm frá høvuðsdekkinum. Frá kjøli til topp av stórmastrini er hæddin 95 cm.

Søgnin sigur, at ein ella fleiri av manningini á Norsku Løvu gjørdu modellið og lótu tað sum olmussugávu til Havnar Kirkju við einum avstingara til Eiðis.

### Hekk í Eiðis Kirkju

Anna Elisabeth Larsen úr Djónastovu á Eiði hevur eitt ískoyti til søguna um kirkjuskipið. Hon greiðir frá:

»Eg havi altíð hoyrt sum barn, at modellið av Norsku Løvu hekk í teirri gomlu Eiðis kirkju, sum varð avloyst av verandi kirkju í 1881.

Eg kann eisini minnast, tá ið eg sum 15 ára gomul var á fundi í bygdafelagnum Glottanum í dansistovuni, at tað varð tosað um Norsku Løvu. Í hesum felag plagdi bygdafólk at taka upp mál av áhuga fyri bygdina.

Har varð eisini sagt, at modellið hekk í gomlu kirkju. Men sum frá leið var tað so illa farið, at modellið varð sett í sakrestiið.

Í 1881 varð alt, sum var inni í gomlu kirkju, flutt í ta nýggju kirkjuna. Havi eisini hoyrt, at tað varð sungið allan vegin sum vanligt tá ið nýggju kirkja verður tikin í brúk.

Men Norska Løva varð løgd inn undir vaðingina, tí hon var ikki í nóg góðum standi at verða hongd upp í kirkjuni.

Hetta dámdi ikki nógvum á Eiði. Tey vildu fegin hava modellið umvælt, so tað kundi koma til rættis í kirkjuni.

Anthon Andreassen, sonur Andrass í Pállstovu á Eiði, var biðin av kirkjuráðnum at savna pening inn til endamálið. Ætlanin var so, at tann gamli seglmakarin Andreas Andreassen, skyldmaður hansara, skuldi umvæla modellið.

Men tað gekk illa at fáa pening inn, so ætlanin varð slept. Tískil kom modellið til Havnar. Her varð tað sent til Danmarkar at vera umvælt, tískil hongur tað í dag í Havnar kirkju.

Tað varð sagt, at Eiðis kirkja fekk modellið frá einum av manningini, sum kom til Eiðis, og sum búði á Látrinum.«

Søgan í Havn sigur, at illa farna kirkjuskipið lá eina tíð hjá kirkjuverjanum í Havn. Í 1914 syrgdu prósturin Jákup Dahl og kirkjuverjin Johan Restorff fyri, at skipið varð siglt niður til Danmarkar við Beskytteren til Orlogsverftið, har serfrøðingurin Otto Dørge riggaði tað til, so tað varð sum nýtt.

Síðan 1917 hevur Norska Løva hingið undir hválvinum í Dómkirkjuni í Havn. Í 1942 gav havnarmaðurin Jens Mørkøre skipinum eina umfatandi "yvirháling."

**ó.**

## Fimmti ára føðingardagur

**Fríggjadagin 23. apríl 2010 verður Helgi Arthursson Hansen, Kambsdalur, 50 ár. Helgi er fuglfirðingur, sonur Amy og Arthur Hansen við Garð. Hann er næstelstur av fýra systkjum**

Helgi er giftur Birgit, ið er ættað frá Gjógv. Hon er yngst av børnunum hjá Esther og Jógvan Nónsgjógv. Tey hava børnini Mortan, sum býr í Svøríki, har hann er undir útbúgving, og so lítlu Amy, sum er fimm ár. Fyrstu árini eftir at tey vóru gift, búðu tey í Horsens.

Helgi byrjaði tíðliga í lívinum at arbeiða. Hann egndi sum smádrongur og arbeiddi á Havsbrún. Seinni lærdi hann til húsasmið. Eftir at hava arbeitt í nøkur ár, sum húsasmiður fór hann undir víðari útbúgving. Fyrst á Tekniska skúlanum í Tórshavn, har hann tók prógv sum byggiteknikari. Eftir tað fór hann til Danmarkar at lesa.

Eftir at Helgi og Birgit vóru liðug við útbúgving í Horsens, hann sum byggifrøðingur og hon sum verkfrøðingur, yvirtóku tey Element- og betongvøruvirkið við Gjógv, sum pápi hennara hevði sett á stovn saman við øðrum. Tað vóru trongar tíðir í byggivinnuni í Føroyum, tá tey í 1991 valdu at flyta til Føroyar fyri at koyra fyritøkuna víðari. Við ágrýtni og hegni eydnaðist tað teimum at hóðra undan kreppuni í nítiárunum, og hava tey rikið virkið saman inntil fyri nøkrum árum síðani, tá Birgit fór í annað starv. Helgi bleiv tá stjóri á virkinum, og er tað enn. Hóast virkið ikki er av teimum stóru, so eru tað ikki so fáir bygningar, ið eru komnir upp runt um í landinum av elementum frá teimum.

Í 1994 valdu Helgi og Birgit at seta búgv á Kambsdali. Har hava tey trivist væl, saman við góðum grannum. Tey hava koyrt til og frá arbeiði dagliga, sjálvt um tað ikki altíð hevur verið lætt at koma til og frá Gjógv um veturin. Frítíðina nýtir Helgi saman við konuni og lítlu dóttrini. Nakað av tíð fer til at passa seyð og til onkran fótbóltsdyst inn í millum.

Føðingardagurin hjá Helga verður hildin heima Kambsdali, har øll eru vælkomin. Vit vilja við hesum ynskja honum hjartaliga tillukku.

**Vinir**

